# Svimjihøllin er perla

**Leiðarin í svimjihøllini í Gundadali, Heri Lava Olsen, heldur, at kommunan átti at givið sær sjálvari vatnland í føðingardagsgávu, nú svimjihøllin, sum verður vitjað av hálvt annað hundrað túsund um árið, fyllir 25 ár**



Týsdagin 18. desember vóru 25 ár síðani, at Svimjihøllin í Gundadali varð tikin í brúk. Tað var 18. desember í 1982. Heri Lava Olsen hevur verið leiðari síðani í 1985, og leiðarin ivast ikki, tá ið hann verður spurdur um, hvat føðingardagsynski hann hevur:

- Tað var eitt stórt frambrot, tá ið vit fyri einari fjórðingsøld síðani fingu svimjihøllina. Hon er framvegis í góðum standi, men krøvini eru størri í dagsins samfelag, enn tey vóru í 1982. Eg havi so ofta sagt, at kommunan átti at bygt út, so vit fingu eitt vatnland vestanfyri høllina ella har, sum ÍSF húsið er. Enn er hetta ikki vorðið veruleiki, men eg vóni og vænti, at býráðið fer at gera álvara av, at fáa hetta ynskið gjørt til veruleika, sigur Heri Lava Olsen.

Hóast høllin er 25 ára gomul, so sæst lítið slit á henni. Tað er tiltikið, hvussu væl arbeiðið í síni tíð varð frágingið, og øll hesi árini hevur tað verið gingið høgt uppí at halda viðlíka tað, sum fyri fjórðingsøld síðani kostaði 40 milliónir at byggja. Kommunan letur svimjihøllini umleið fimm milliónir um árið at reka og viðlíkahalda høllina fyri.

Høllin er opin so at siga alt árið og hvønn einasta dag. Undantøkini eru størstu høgtíðsdagarnir, á Ólavsøku og so í desember mánað, tá ið tað plagar at vera stongt í tríggjar vikur, meðan tað viðlíkahaldsarbeiðið verður fingið frá hondini, sum tað ikki ber til at gera, meðan fólk er í høllini. Í ár var tó bara stongt í tvær vikur. Í desember á hvørjum ári taka starvsfólkini lívbjargararoyndina og 1. hjálparroyndina.

- Vit gera nógv við viðlíkahaldið. Tað er alneyðugt eitt nú, at vatnringrásin er í lagi Meginreglan er, at tað við at vera upp á forkant skal sleppast undan akuttum brekum. Tað hevur eydnast væl. Higartil hava vit bara fýra ferðir verið noydd at steingja orsaka av tekniskum breki. Tríggjar ferðir ein dag og eina ferð í tveir dagar, greiðir Heri Lava Olsen frá.

Frá klokkan níggju og inntil klokkan trý korter til trý eru skúlabørn og ungdómar í høllini, og frá klokkan trý og inntil klokkan 20.30 er aftur almenn svimjing. Eftir almennu svimjingina eiga svimjifelagið og froskmenn høllina. Tá ið tað klokkan tíggju á kvøldi verður stongt, hevur tað verið ljós ímillum fimtan og sekstan tímar. Tað sæst aftur í nýtsluni, og tað sæst aftur í starvsfólkaliðnum. Høllin brúkar fyri 90 túsund krónur í el um mánaðin, og oljunýtslan er 200 tons um árið. Starvsfólkatalið er 25, tá ið vikuskiftisavloysararnir eru tiknir við.

- Hýrurin millum starvsfólkini er góður, og vit taka tað sum tekin um, at teimum dámar væl her, tá ið mong teirra, sum hava verið í starvi, søkja aftur sum frítíðaravloysarar, meðan tey eru undir útbúgving uttanlands.

Uppgávan hjá starvsfólkunum er at hava eftirlit í høllini og umklæðingarrúmunum, at vaska og at sita í búrinum, sum tey kalla atgongumerkjasøluplássið. Saman við leiðaranum er ein varaleiðari. Tað er Jóannes Niclasen. Teir báðir leiðararnir fáast við viðlíkahaldsarbeiðið.

Tað kann ikki sigast annað, enn at leiðarin er rættuliga bundin at høllini. Skipanin er soleiðis, at um okkurt brek kemur fyri í høllini, so boðar fartelefonin hjá leiðaranum frá. Soleiðis er tað, tá ið tað eitt nú er brek á elskipanini ella oljufýrinum.

- Tað kemur meiri enn so fyri, at tað verður boðað frá onkrum, sum skal rættast beinanvegin. Tað er kanska ikki altíð so hugaligt at verða útpurraður mitt á nátt, tá ið tað er illveður, men hesum hava vit so liva við øll hesi árini. Skipanin ber eisini við sær, at Jóannes ella eg sjálvur altíð má vera tøkur, so vit eru ongantíð báðir úr Havnini í senn, greiðir Heri frá.

## Serlig mentan

Svimjihøllin í Gundadali er væl umtókt. Talið á vitjandi hvørt árið liggur um hálvt annað hundrað túsund. Tað vil siga, at tað higartil hava verið einastaðni millum tríggjar og fýra milliónir vitjandi, og at svimja í Gundadali er partur av gerandisdegnum hjá so nógvum.

- Ein túrur í høllina hoyrir við til gerandisdagin hjá so nógvum. Fyrrapartsvaktin møtir klokkan hálvgum sjey, og tá ið hurðin verður latin upp klokkan trý korter til sjey, standa nøkur og bíða uttanfyri. Rutinan er so mikið inngrógvin hjá nógvum, at tað ber til at seta klokkuna eftir teimum. Starvsfólkini vita eitt nú, at Simme plagar at smoyggja sær inn um júst, áðrenn vit klokkan níggju steingja fyri almennu svimjingini. So viðhvørt verður tikið til, at nú er tíð at steingja, tí Simme er komin, ella at tað verður spurt, tá ið tað verður stongt, um Simme er komin, sigur Heri Lava Olsen.

Morgunfrúurnar møta um átta tíðina. Tær kunnu vera upp í einar 25 hvørja ferð, og tær geva sær góðar stundir. Hjá summum monnum verður tað gingið høgt upp í løtuna í hitarúminum. Nakrir møta áðrenn klokkan sjey og geva sær góðar stundir í saununi, eftir at teir hava svomið nakrar longdir, og aðrir svimja og sita í hitarúminum, tá ið teir eru lidnir við arbeiðsdagin.

- At sita í hitarúminum er tiltikið. Har verður nógv prátað, og situatiónin í býnum, í landinum og øllum heiminum verður aftur og aftur vend. Henda traditiónin er so gomul, sum gamli svimjihylurin. Um vetrarnar var baðstovan opin tvær ella tríggjar ferðir um vikuna, og tá vóru nakrir fastir fúsir í hitarúminum. Eitt nú Klerens, Karl hjá Talisi og beiggi hansara Hans, William Sloan, Jacob Lindenskov og ikki at gloyma Jóhan Norðfoss og Ivan Carlsen, sum dámdu væl at sita saman við fryntligu havnarmonnunum, sum vistu nógv at greiða frá, vóru bersøgnir og eisini hittinorðaðir.

- Tað er serlig mentan at vitja hitarúmið, og eg veit, at blaðstjórin á Sosialinum saman við fleiri politikarum kann skriva undir upp á hetta. Tíbetur fáa vit støðugt nýggj fólk í hitarúmið, bæði yngri og eldri. Eg havi ofta lagt til merkis, at tá ið fólk fara úr arbeiði, tí tey eru fallin fyri aldursmarkinum, so fara tey at vitja svimjihøllina rættuliga ofta. Tað gera tey regluliga, men um stígur kemur í, so tykist tað sum um, at tað er tungt at koma í gongd aftur.

Tann, sum hevur skrivað hesar reglur, kann av egnum royndum og saman við so mongum øðrum, sum dagliga vitja í Svimjihøllini í Gundadali, skriva undir uppá, at høllin er ein perla í høvuðsstaðnum.

*Hvussu komu tit á navnið Svimjihøllin í Gundadali?*

- Navnið er einfalt og rættuliga upplagt. Høllin hevði einki navn tey fyrstu árini. Í onkrum formligum ella almennum pappíri sá eg, at hon varð nevnd Tórshavnar Svimjihøll ella okkurt sovorðið. Hetta kendist tungt og stirvið. Gunnar Hoydal, sum var býararkitektur og hevði teknað høllina, og eg tosaðu eina ferð um hetta. Eg helt